# Normek: Ynskja at koma longur út

**– Vit hava eitt greitt mál við at fara á Faroexpo: Vit ynskja at fáa samband við kundar í øðrum londum, m.a. innan sólorkuna, sigur Erling Jacobsen, sølumaður hjá Normek í Norðragøtu**

FAROEXPO
*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*




*Hjá Normek gera teir bæði stór og smærri arbeiðir – á myndini v.m. Erling Jacobsen og Johnny K. Nón*

**Norðragøta:** Hóast sólin ikki skínur so ofta her hjá okkum, so vísir tað seg kortini at føroyingar hava stóran áhuga í sólorkuskipanini hjá Normek.

Teir hava longu selt fleiri slíkar skipanir til sethús kring alt landið — m.a. til Havnar, Runavík, Hósvík og í Miðvági.

Hesar skipanir kunnu tó ikki nýtast ístaðin fyri ta vanligu elveitingina. Her verður mest hugsað um at hita vatn upp til húsarhaldið.

Hesar skipanirnar eru framúr góðar, og minna nógv um tær, sum aðrir framleiðarar gera. Men tað er kortini ein stórur munur:

– Okkara skipan kemur úr Polen, har kostnaðarstøðið ikki er so høgt. Og tí er okkara skipan bíligari enn tær hjá øðrum, sigur Erling Jacobsen.

Men teir á Normek eru sannførdir um at henda skipanin eisini kann seljast í øðrum londum. Teir hava einaumboð uppá hesa skipanina í Norðurlondum, og síggja tí stórar møguleikar í Faroexpo í næstu viku.

## Fiskur og kranar

Normek kann í stuttum lýsast sum eitt vanligt maskinverkstað, sum tekur sær av tænastuum innan fiskivinnuna, alivinnuna og annað á landi.

Eitt annað øki hjá Normek er søla av teimum sonevndu HIAB-kranunum. Fyritøkan er einaumboð av hesum kranum í Føroyum.

At vera einaumboð tað forpliktar eisini fyritøkuna í stóran. Og tað vita teir hjá Normek.

Gjøgnum hesa umboðan ynskja teir altíð at veita kundum teirra loysnir til ein hvønn tørv, tá talan er um kranar til ymisk endamál. Men ikki nokk við tað:

– Gjøgnum hesa umboðan, leggja vit eisini stóran dent á at hava neyðugan førleika, fyri at kunna veita eina góða tænastu innan viðlíkahald og umvæling av kranum.

— Tí skipa vit soleiðis fyri, at tey starvsfólkini, sum hava ábyrgdina av kranunum, eru regluliga á skeiðum í Danmark, sigur sølumaðurin.

Við seinastu útbyggingini hjá fyritøkuni er sera einfalt at røkka hesum endamáli. Til ber at taka inn kranar, bussar og annað til umvælingar í høllini.

Hevur tú hinvegin størri áhuga í dekkum og sportsfelgum, so ber eisini til at tosa við teir hjá Normek um tað. Á heimasíðuni hjá fyritøkuni kann ein nevniliga bíleggja hetta umvegis alnótina.

Hjá Normek arbeiða í løtuni 20 mans.



*Nógv føroysk húski hava longu útvegað sær sólkyknur. – Nú skal henda framleiðslan eisini út í heim, sigur sølumaðurin, Erling Jacobsen*

# Farpack: Vøran skal vera av besta slagi

**Farpack hevur síðan tað vrð stovnað fyri 11 árum síðani lagt dent á góðsku og at virkið samstarv við veitarar teirra**

FAROEXPO
*Snorri Brend*




*Vøruskráin hjá Farpack er økt ár undan ári. Í dag hevur fyritøkan størsta føroyska úrvalið av pakkitilfari, pakkiútgerð og pakkiamboðum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Havn:** Lýsingin var ikki sum aðrar lýsingar. Og tað var helst ikki ætlanin heldur.

Teksturin til lýsingina var hin einfaldi: Pakkitilfar til øll endamál. Men myndin til hesa lýsing var kortini ein, sum fekk fólk at steðga á og lesa tekstin.

Miðskeiðis í lýsingini sást nevniliga ein persónur, sum var pakkaður og innballaður sum ein mumia - í tilfar, sum sjálvandi var keypt hjá Farpack.

- Skal okkurt pakkast inn, so hava vit loysnina, varð boðað frá í hesi lýsingini.

Nú Faroexpo stendur fyri framman er heilt natúrligt at Farpck er millum luttakarnar.

## Oljuvinna

Á stevnuni í Runavík í komandi viku fer Farpack at luttaka saman við OSR á Tvøroyri. Hesar báðar fyritøkurnar hava eitt samstarv, sum luttakarnir á Faroexpo eisini skulu gerast varugir við.

OSR (Oil Spill Response) tekur sær av at skipa eina tilbúgving um ein oljudálking tekur seg upp, so umboðar Farpack í dag størsta úrvalið av øllum tí, sum hoyrir til pakning á sjógvi og landi.

Men við teim møguleikum, sum vónandi liggja í eini komandi oljuvinnu, eru fyritøkurnar báðar í einum samstarvi, tá ein kemur so langt.

At Farpack haraftrat hevur fingið ISO-góðkenning ger bara tað, at fyritøkan lýkur øll krøv innan t.d. innkeyp, marknaðarføring, sølu og flutning av pakkitilfari og øðrum vørum til fiskivinnuna og annan ídnað.

Á heimasíðuni hjá fyritøkuni ber til at lesa alt um fyritøkuna, tær vørur og tær tænastur sum hon kann veita.

Tað byrjaði við einum ávísum úrvali av pakkitilfari og tí, sum hoyrir til fiskivinnuna. Síðani tá er vøruskráin økt munandi, soleiðis at ein í dag kann staðfesta at vinnan her hjá okkum sum heild er at meta sum kundar teirra, eins og fleiri kundar úti í heimi.

- Og menningin heldur bara áfram, og vøruskráin økist alsamt. Hetta hevur ført við sær, at Farpack hevur Føroya størsta úrval av pakkitilfari, pakkiútgerð og pakkiamboðum til alla vinnuna á sjógvi eins og á landi.

Útvegararnir hjá fyritøkuni eru allir valdir eftir serstøkum eyðkennum. Hetta førir við sær, at teir skulu helst hava umhvørvisgóðkendar vørur.

- Tað er alneyðugt at vøran er av besta slagi og livir upp til ásettu fyrimyndina. Vit hava fingið eitt sera gott samstarv við okkara útvegarar, sum eru sera góðir at finna røttu loysnirnar til okkum.

- Og hetta kemur so aftur kundanum til góðar, sigur Farpack.